## Jón Brian um ítrótt

Eg verði fasineraður av vinnaramentalitetinum, sum sæst nógva staðni í ítróttinum. Tann mentalitetin kundu vit eisini útnytta aðrastaðni í samfelagnum.




## Jón Brian um politikk

Góður politikkur er ein grundarsteinur undir fólkaræðinum, og tí hava politikarar stóra ábyrgd. Tekur ein politikkari ikki hesa ábyrgd í álvara og letur politikk blíva til fjas, so endar tað við politiskari líkasælu millum fólk – og tað er vandamikið.

# Jón Brian spyr til h

**- Tað er einki endamál í sær sjálvum at steikja fólk fyri opnari mikrofon, men tað eru ávísar støður, har fólk helst vilja sleppa undan at svara kritiskum spurningum, og tá er neyðugt at spyrja upp í saman fyri at fáa eitt svar, sigur útvarpsmaðurin Jón Brian Hvidtfeldt, sum er kosin til ársins journalist í Føroyum. Vit fingu eisini eitt svar, tá ið vit spurdu hann um fuglfjarðardialektina hjá honum**




## Samrøða



Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Tað eru langt frá øll, sum vita hvussu Jón Brian Hvidtfeldt sær út, men tey flestu kenna eyðkendu røddina aftur, tá ið hon er at hoyra í útvarpinum. Fuglfjarðamálið er serstakt millum hinar røddirnar í lurtinum, og hann smæðist ikki burtur við sínari dialekt.

Tað venda vit aftur til.

Farna vikuskiftið var fuglfirðingurin í Sortudíki heiðraður á fakfestivalinum hjá journalistunum. Hann varð kosin sum ársins journalistur fyri sítt arbeiði farna árið, og tað var ein stórur heiður hjá 29 ára gamla útvarpsmanninum, ið fekk sína útbúgving fyri trimum árum síðani.

- Eg havi nátt setningin, eg setti mær, tá eg fór undir at útbúgva meg sum journalist, segði Jón Brian, tá ið hann fekk heiðurin.

### Gera mun

Tað var ikki av tilvild, at Jón Brian Hvidtfeldt endaði á Danmarks Journalisthøjskole í Århus.

- Tað er ein gamal tanki at blíva journalistur. Tað var tað, sum eg helst vildi, sigur hann.

- Vit kenna øll til at verða forargað inn á okkurt og siga, at "tað er for galið, at...", men so gera vit ikki meira við tað. Sum journalistur kanst tú gera mun í samfelagnum og gera okkurt við tað, sum fólk argast inn á.

- Frusteratiónin hjá einum journalisti kann hinvegin verða, at tú bert røkkur einum lítlum parti av tí, sum tú kundi hugsa tær at fingist við, men tá ið tú so gerst mun á onkran hátt, er tað sera hugaligt, sigur Jón Brian.

Hjá honum og øllum øðrum journalistum er jagstranin eftir góðu søguni ein týðandi partur av yrkinum.

- Journalistikkur er eitt spennandi fak, sum hevur nógvar nuansir. Tú fært møguleikan at tosa við nógv fólk, sum liggja inni við stórari vitan og hava eina søgu at siga, tú kanst seta mál inn í ein samanhang, og spenningurin er altíð stórur, tá ið tú fært fatur á einari góðari søgu.

- Ein góð søga nýtist ikki endiliga at verða ein gøla, hon kann verða so nógv annað. Men drívmegin hjá einum hvørjum journalisti er tann góða søgan.

### Góða søgan drívmegi

Stundum fáa journalistar skotið í skógvarnar, at teir bert hugsa um at finna negativar søgur, men Jón Brian heldur, at kritiski